## Skip sigldi á bláhval

Í síðstu viku rak ein deyður bláhvalur upp á land í amerikanska statinum Kalifornia, og kanningar staðfestu, at hvalurin hevði fingið stóran skaða av einari skipsskrúvu. Nógv bendir á, at hvalurin kom ov nær einum rannsóknarskipi. Manningin á skipinum hevði boðað frá, at hon hevði kent ristingar í skipinum, og at menn stutt eftir sóu ein bløðandi hval stutt frá skipinum. Bláhvalurin er heimsins størsta djór, og teir størstu kunnu vera um 30 metrar langir. Tann, sum rak á land í Kalifornia, var 20 metrar langur. Bláhvalurin er friðaður sum eitt hótt djóraslag.



## Vilja banna royking

Danska kommunufelagið mælir nú sínum limakommunum til at banna allari royking í millum annað skúlum og dagstovnum, og bannið skal galda bæði innan- og uttandura. Stendur tað til felagið, verður tað bannað at roykja inni í øllum kommunalum bygningum, og harafturat verður tað bannað at roykja uttandura í skúlum, dagstovnum og øðrum stovnum, har børn eru. Kommunufelagið sigur, at endamálið við roykibanninum er eitt fyribyrgjandi átak og lið í royndunum at bøta um heilsuna hjá dønum.

# varð lagdur



*Hóast Páll á Reynatúgvu fyri langari tíð síðan hevur boðað frá, at hann fór at leggja kongin – nú familja hansara er drigin upp í kommunalpolitikkin – og tí skuldi verið klárur at leggja frá sær. So fjaldi hann ikki missin, tá fundurin var av*

### Gegni

Nú eigur borgarstjórin aftur leik.

Bjørn á Heygum, advokatur, verður biðin at greiða og tulka tveir spurningar og tvey svar, sum Páll á Reynatúgvu hevur sett Innlendismálaráðnum og hevur fingið svar uppá.

Tó hevur borgarstjórin onki svar klárt til álvarsligastu ákæruna, um at hann setti sína egnu konu í starv sum leiðara fyri barnavernadartænastuna.

Advokaturin er byrjaður at greina fyrra spurningin, sum er ein generellur spurningur um gegni.

Um nær ein kommunustýrislimur er ógegnigur, tá játtan skal setast til stovnar, har teirra avvarðandi starvast.

Svarið hjá advokatinum verður tí eins generelt, sum spurningurin hjá Páll á Reynatúgvu og svarið hjá Innlendismálaráðnum, hóast øll í størra salinum í bygninginum hjá kommununi vita, at veruligi spurningurin er, hvørt Páll á Reynatúgvu var ógegnigur, tá avgjørt var, at játtanin til tilhaldið, har kona Páll eisini fær løn, ikki skuldi skerjast.

Men svarið verður latið í mun til spurningin.

– Er talan um generalla viðgerð av játtan kommunalan stovn, so er ikki talan um ógegni, staðfestir advokaturin.

Páll á Reynatúgvu smílist til áhoyrararnar, men tað ger Brandur Sandoy als ikki.

– Hvat so, um spurningurin er, um at taka játtanina av?, spyr Brandur Sandoy

– Ja, tá nærkast vit einum marki, har tað fær fíggjarligan týdning fyri til dømis eitt húski, og tí nærkast tað markinum til ógegni, metir advokaturin.

Brandur Sandoy kennir seg aftur omaná, men Páll á Reynatúgvu er hinvegin sannførdur um, at ekspertarnir hava reinsað hann fyri ákærurnar.

### Kongur lagdur

Maðurin við borðendan tekur orðið.

– Nú er punktið »møguligt val av borgarstjóra« á skránni.

Áhoyrararnir, sum dovnaðu eitt sindur, meðan ekspertarnir komu við sínum framløgum, ressast nú við.

Ein verjurøða byrjar. Páll á Reynatúgvu heldur seg ikki hava gjørt nakað skeivt í síni tíð sum borgarstjóri. Hann heldur ikki, at politiska støðan er so nógv broytt í mun til vanligt politiskt stríð, men ein munur er hesaferð: Kona og familja hansara eru drigin upp í politikkin.

So kemur niðurstøðan, sum fá roknaðu við áðrenn fundin.

– So havi eg gjørt av at leggja frá mær sum borgarstjóri á Sandi. Ikki tí eg meti tað vera rætt ella rímiligt, men tí at politiski veruleikin nú gjørdist sum hann gjørdist, lesur borgarstjórin úr pappíri, hesa seinastu aktina í partinum av leikinum, hann stjórnar púra einsamallur.

Nærum kirkjuliga tøgnin millum áhoyrararnar, sum hevur valdað seinasta langa tíman verður brotin. Tutl er allastaðni.

Brandur Sandoy fegnast. Boðini koma onkursvegna óvart á hann. Men smílið er ikki at taka feil av.

Páll á Reynatúgvu skrivar undir, at hann vil verða loystur úr starvi, og reisir seg úr sessinum við borðendan, har hann trúliga hevur sitið seinastu níggju árini.

Stóri maðurin í hædd og atkvøðum á Sandi er nú lítil. Reyði liturin í andlitinum útstrálar ikki viljan, hann ofta hevur gjørt, men heldur eina avmakt.

### Nýggjur borgarstjóri

Eyðvarur Petersen, varaborgarstjóri, er nú virkandi borgarstjóri, og sessast við borðendan.

Virkandi borgarstjórin ger klárt til val av nýggjum borgarstjóra og vil hava uppskot.

– Eg skjóti upp Brand Sandoy.

Poul Klementsen er avgjørdur.

Hetta var tað fólk roknaðu við. Brandur skifti part fyri borgarstjórasessin, hann eisini ynskti beint eftir valið.

– Eg skjóti upp Olgu Fossdalsá.

Páll á Reynatúgvu ger sína fyrstu handling, sum vanligur kommunustýrislimur í nýggju ár.

So verður atkvøtt.

Fyrst, um Brandur Sandoy skal gerast borgarstjóri.

Fýra hendur fara upp. Tær somu fýra hendurnar, sum skrivaðu undir fyrsta brævið til Páll á Reynatúgvu at leggja frá sær.

Atkvøtt verður eisini fyri Olgu Fossdalsá. Tey trý, sum ikki stuðla Brandi Sandoy, koyra hondina upp.

Nú er Brandur Sandoy borgarstjóri á Sandi.

Og hansara fyrsta gerð sum borgarstjóri, er at biðja um, at fundurin verður avbrotin.

Við meirilutanum verður hetta staðfest.

### Stríðið neyvan av

So hendi tað.

Nýggjur borgarstjóri er á Sandi, eftir nýggju árum við Páll á Reynatúgvu.

Flestu áhoyrararnir tysja út. Tey illneitast longu í gongini.

Nøkur fá sita eftir. Spakuliga hætta tey sær at ynskja nýggja borgarstjóranum til lukku við sessinum. Tað ger fráfarni borgarstjórin ikki, og úr túninum hoyrist málageipan.

Ónøgdin er stór við hendingarnar. Talvið er av, men nýtt talv er longu byrjað. Fyrrverandi borgarstjórin situr einsamallur við umleið einum fjórðingi av øllum atkvøðum í kommununi uttan fyri vald, meðan nýggi borgarstjórin hevur stuðul frá meirilutanum av kommunustýrinum, men fekk til seinasta val bert 31 atkvøður.

Bygdin gongur nú í tveimum. Annað hvørt eru fólk við Páll á Reynatúgvu ella eru tey ímóti honum. Men kongurin er lagdur og nýggjur maður situr við borðendan næstu trý árini, um hann ikki eisini eina ferð velur at leggja frá sær.